# Dagstovnagjald

VÁGA KOMMUNA

Dagstovnagjaldið fyri ansing av børnum í Vága kommunu er, sum víst niðanfyri:

Gjaldið fyri børn í aldrinum frá **0 til tey fylla 3 ár** er kr. **2.270,-** í 11 mánaðir, juli mánaði er fríur.
Gjald fyri hálva tíð er kr. **1.250,-.**

Gjaldið fyri børn frá **3 ár og til tey fara í skúla** er kr. **1.750,-** í 11 mánaðir, juli mánaði er fríur.
Gjald fyri hálva tíð er kr. **970-.**

Gjaldið fyri **frítíðaransing** er kr. **1.140,-** í 10,5 mánaðir, juli og hálvur august mánaði eru fríir.
Gjald fyri hálva tíð er kr. **630,-.**

**Systkinafrádráttur:**

Um foreldur hava fleiri børn í barnaansing, verður fult gjald goldið fyri yngsta barnið, 75% fyri næsta barnið og 50% fyri triðja barnið.

Systkin eru:

- Lívfrøðilig systkin, ið bæði búgva hjá antin faðir ella móðir, ið hevur foreldramyndugleikan.
- Ættleidd systkin, stjúksystkin, ið hava sama bústað sambært fólkayvirlitinum.

Til tess at fáa systkinaavsláttur skal barnið búgva í Vága kommunu.
Búgva foreldrini ikki saman, men hava felags foreldramyndugleika, verður barnið roknað sum systkin, har barnið býr sambært fólkayvirlitinum, sama hvørt barnið býr javnt nógv hjá báðum foreldrum.

Reglurnar fata um børn, ið ganga í barnagarði og í frítíðarskúla sambært dagstovnalógini.

**Á býráðsfundi tann 20. November 2017**, samtykti býráðið, at loft skuldi leggjast á foreldragjaldið.
Hægsta foreldragjald fyri barnaansing er nú **kr. 3.000,-.**

**Kommunan tilskilar sær rætt at krevja foreldragjaldið við sjálvvirkandi gjaldskipan.**

Sandavági, tann 22. desember 2020

**Vága býráð**

Eyðdis H. Niclasen, borgarstjóri

Hammershaimbsvegur 1 // FO-360 Sandavágur
Tel +298 344 400 // vaga@vaga.fo